

# Góða samkoma í Evangeliihúsinum

Nú farið er um heystjavndøgur, og dagarnir gerast alsamt styttri, er gott at vit ganga einari hugnaligari og fjálgari høgtíð á møti. Spakuliga og stillisliga er farið at stundað til jóla. Okkum rennur í hug orðini hjá Mariu moy á sinni: Eg eri tænastukvinna Harrans, mær verði, sum tú hevur sagt. Um hetta er hjartans hugburðurin hjá okkum í Evangeliihúsinum, fer okkara samkoma at blóma og vaksa enn meira og vera øðrum til signing. Familjurnar fara at gerast sterkari, og okkara ungu spírar fara at festa sterkari røtur í Gudi. Hann, sum spardi ikki Sín egna Son, men gav Hann fyri okkum øll, hvussu skal Hann kunna annað enn geva okkum alt við Honum.

***Hesi lyfti eiga vit, sum hava sett okkara álit á Hann.***

## Skrá fyri serlig tiltøk í samband við jólini:

**Týskvøld 15. november kl. 20.00**
Kvinnumøti í Evangeliihúsinum.

**Hóskvøld 24. november kl. 19.00**
Jólahugni fyri Minisalt. Hetta er seinastu ferð í ár.

**Sunnudag 4 desember kl. 11.00**
Sjónvarpsupptøka. Felagsmøti við Filadelfia.

**Mánadag 5.desember kl. 20.00**
Síðsta bønarmøti í ár í Evangeliihúsinum.

**Mikudag 7. desember kl 17.15**
Síðsta venjing hjá barnakórinum.

**Mikudag 7. desember kl. 19.00 – 21.00**
Kobling hevur jólahugna. Hetta er seinasta ferð í ár.

**Sunnudag 11. des. kl.16.00**
Sunnudagsskúlin skipar fyri jólafest.
Einki morgunmøti er hendan dagin.

**Sunnudag 18. desember kl 19.00**
Jólakonsert. Einki morgunmøti er hendan dagin.

**Jólaaftan 24. desember kl. 15.30**
Jólagudstænasta.

**Fríggjadag 30. des. kl 13.00**
Giftast Arne og Hansina í Evangeliihúsinum.

*Reseptión verður eftir vígsluna í Evangeliihúsinum. Veitsla verður fyri innbodnum um kvøldið.*

**Einki morgunmøti verður nýggjársdag í 2012.**

**Mánadagin 2. januar kl. 20.00**
Verður bønarmøti sum vant í Evangeliihúsinum.
Øll eru hjartaliga vælkomin á bønarmøti.

Leiðslan í Evangeliihúsinum takkar fyri eitt gott ár, og sær fram til eitt nýtt ár við nýggjum møguleikum og nýggjum avbjóðingum saman við samkomuni.

***Vinarliga***

***Anna Sofía og Henrik · Ann Gvøðny og Johannes · Birgit og Niclas***
***Majbritt og Sveinbjørn · Rigmor og John***

Evangeliihúsið | Tróndargøta 36 | Tórshavn | e-mail: gospel@gospel.fo | www.gospel.fo